# Landsliðið fer á Bankan

**Atlantic Airways verður framhaldandi høvuðsstuðul hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, men afturat sær hevur flogfelagið nú Føroya Banka**

SPONSORAVTALA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu nógvu árini hevur Atlantic Airways verið partur av føroyska landsliðshópinum. Bæði sum flutningsfelag, og ikki minst sum høvuðsstuðul hjá fótbóltslandsliðnum.

Stjórin í felagnum, Magni Arge, hevur ongantíð dult týdningin, sum landsliðið hevur fyri føroyska ferðavinnu – og harvið Atlantic Airways – og mikudagin á miðdegi varð hetta undirstrikað, tá Atlantic Airways enn einaferð skrivaði undir tvey-ára sponsoravtalu við FSF.



*Í miðdegi mikudagin skrivaðu Fótbóltssambandið, Føroya Banki og Atlantic Airways undir sponsoravtalu, sum er galdandi fyri tey bæði næstu árini*

*Mynd: Jonhard Hammer*

## Hava nógv í felag

Hetta er sætti sponsorsáttmálin, sum flogfelagið ger við Fótbóltssambandið, so ikki kann sigast annað enn, at Atlantic hevur verið FSF ein drúgvur stuðul, men sambært stjóranum, so eru teir á ongan hátt vorðnir troyttir av hesum enn.

– Tað kemst av tí, at vit eru onga løtu í iva um, at føroyska fótbóltslandsliðið er fremsta vørumerki, sum føroyingar eiga, til tess at gera vart við seg í umheiminum. Tað veit ein og hvør, sum hevur ferðast uttanlands fyri einum tíggju árum síðani og so nú. Útlendingar vita í dag nógv meira um Føroyar, enn tey gjørdu tá, og tað er stórt sæð orsakað av fótbóltslandsliðnum og teirri positivu umtalu, sum hetta skapar fyri okkum.

Hóast Atlantic Airways sostatt fær stóru nyttu úr tí, sum fótbóltslandsliðið avrikar, so er spurningurin tó eisini, um felagið ikki hevði fingið eins stóra nyttu, um onkur annar var høvuðsstuðul. Hesum er Magni Arge heldur ikki heilt ósamdur í, men hann leggur tó dent á, at tað eisini eru onnur viðurskifti, sum gera seg galdandi í hesum.

– Fyrst og fremst, so vilja vit fegin vera við til at at stuðla landsliðnum, og hartil, so eru eisini rættiliga nógv ting, sum knýta okkum saman. Bæði Atlantsflog og FSF fóru í altjóða kapping um somu tíð. Í báðum førum vóru fólk flest tó rættiliga ivasom um, hvørt hetta var eitt skilagott stig at taka, og í báðum førum hava prógvað, at tað ber til, um tú bert hevur viljan og áræðið til tað. Og ikki minst, so hava vit bæði tvey framvegis ambitiónir um at koma víðari í altjóða høpi.

– So alt í alt, so vilja vit heldur enn gjarna tryggja, at tað framhaldandi ber til hjá fótbóltslandsliðnum at taka lut í altjóða kapping. Og at enda vil eg siga, at hetta er so eisini okkara stuðul til føroyskan fótbólt. Sum tjóðarflogfelag, so kunnu vit við hesum stuðla samlaða føroyska fótbóltsheiminum, og tað gera vit fegin, sigur altso Magni Arge at enda.

## Ikki einsamallir

Atlantic Airways verða tó ikki einasti høvuðsstuðulin hjá landsliðnum hesi komandi árini.

Í mun til fiskivinnuna, har talan framyvir verður um skerda veiðu á Føroya Banka, so hevur FSF nevniliga fingið Føroya Banka afturat sponsorpakkanum.

Slíkar loysnir hevr FSF áður havt, og eitt nú var Vest-laks í fleiri ár høvuðsstuðul saman við Atlantsflogi. Nú hevur tað so eydnast at fáa Føroya Banka við í eini slíkari loysn, soleiðis at sponsorgrundarlagið undir landsliðnum er enn tryggari.

Sum vant, so bar ikki til at fáa upplýst, hvussu stórar upphæddir sponsoravtalan snýr seg um, men tað er einki at ivast í, at talan verður um eitt gott ískoyti til raksturin av flaggskipinum hjá føroyskum fótbólti.


# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**RENAULT CLIO 2,0 16V 172 HK**
Árg Mar-01, Km 28.000. Bilurin hevur t.d. aircondition, sentrallás, sportsetur, 17" alufelgir, og tokulyktir. Alt er originalt. Nýprísur kr. 250.000. Prísuppskot kr. 158.000.
**Tel. 316780 / 222353**

**LÝSIÐ**
**við**



**brúktum bilum í Sosialinum**



**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg Apr-98, Km 28.000. Top modell: Bert koyrt 28.000 km. Klimaanlegg, Leðurinntrekk, Sóltak, El-rútar, El-spegl, Fj.-stýrt centrallás, Radio, Alufelgur, Spoylarar v.m. Sertilboð kr. 198.000.



**KIA CARNIVAL 2.9 HPDI EX MODEL**
Árg Mar-02, Km 195.000. Top modellið: Aircondition, Automatgear, Regnsensor, El.-stýrt førarasetur, El rútar fr.+ aftan, El.spegl, Fjarstýrt centrallás, Hita í forrúti, C.D.anlegg, Mjørkal.-Leður róður v.m. (Nýprísur: 325.800,-). Kr. 218.000.



**KIA SEPHIA II 1.5 SLX**
Árg Apr. 1999, Km 71.000. El.-rútar. fr.- Valnød Instrumentbretti, Takboylar, Sleipikrók v.m. Kr. 86.000.



**OPEL ASTRA 1.6 STC. VØRUVOGNUR**
Árg Apr. 1999, Km 28.000. Bert koyrt: 28.000 km, Fjarstýrt Centrallás, Radio v.Bandspælara, Takboylar v.m. Kr. 75.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR. 4 HJÓLSTREKK**
Árg Mar-98, Km 63.000. Bakkisensor, 4 WD v.Reduktiónsgear, Fjarðstýrt centrallás, El.-rútar, El-spegl, C.D.Anlegg v.m. Kr. 118.000.



**NISSAN ALMERA 1.6 GX**
Árg Maj 1998, Km 61.900. Alufelgur, C.D.Anlegg, Fjarstýrt centrallás, El.-rútar, El.-Spegl v.m. Kr. 98.000.



**TOYOTA AVENSIS TURBO DIESEL**
Árg Aug-00, Kr. 124.000.



**ROVER 620 TURBO INJECTION 200 HK**
Árg Jul-99, Km 94.000. Top modellið: 200 HK Turbo, Leður Inntrekk, Sóltak, Aircondition Alufelgur, C.D.-Anlegg v.m. Kr. 168.000.



**LAST TIL PICK UP BILAR**
Sum nýggj Pick up Last við síðulúkum /aftan ( MVG fæst aftur av prísinum). Kr. 4.500.

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**





**Vinn ferð til Old Trafford** **Dreymaferð til dreymanna leikvøll**

# Manchester United vs Liverpool FC



Dysturin verður leiktur á Old Trafford mánakvøldið, 20. september. Flogið verður beinleiðis við Atlantic Airways til Manchester, har steðgað verður í tveir dagar. Gist verður á 4-stjørnaðum hotelli, og eisini verður skipað fyri rundferð á Old Trafford.

Meira fæst annars at vita um túrin á www.mb.fo

FØROYAPRENT



Í mannamunni hevur Old Trafford í mong ár borið heitið, Theatre of Dreams. Og tað er eingin loyna, at tað eisini er dreymurin hjá mongum at síggja the Mighty Reds spæla á heimavølli.

Saman við MB-Tours hevur tú nú møguleikan til at fáa dreymin uppfyltan. Tann 20. september er nevnliga ein av ársins dystum í Premier League, tá Manchester United tekur ímóti Liverpool. MB-Tours skipar í hesum sambandi fyri ferð til dystin, og saman við Sosialinum lutar MB-Tours eisini eina ferð fyri tvey burtur til dystin.

Fyri at vera við í kappingini um dreymaferðina krevst bara, at tú tekur lut í kappingini, sum Sosialurin skipar fyri. Kappingin um hetta fer av bakkastokki í dag og heldur so fram tey níggju komandi bløðini.

Hvørja ferð eru tríggir spurningar, sum hava eitthvørt við hesi bæði mætu ensku feløgini at gera. Alt, sum tú skalt gera, er at svara spurningunum, so hvørt hesir eru í blaðnum, og síðani senda teir tíggju svarleparnar inn til okkara. Brævbjálvar við seðlunum skulu merkjast "kapping", og skulu sendast til:
**Sosialurin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Saman við svarlepunum skulu vit hava upplýsingar um navn, bústað og tlf. nummarið hjá tær. Drigið verður um vinningin mánadagin 30. august, og mugu seðlar til kappingina tí vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin, 28. august.

Klipp henda spurnarlepa út, og send til Sosialin

**1.** Hóast hann ofta varð útskeldaður, er hesin leikarin helst ein av stinnastu verjuleikarunum í søguni hjá Liverpool. Í alt gjørdist talan um 648 dystir í Liverpool og 50 landsdystir fyri Ongland. Hvør var leikarin, sum varð eyknevndur "concorde", og sum eisini slapp at royna seg sum hjálparvenjari hjá enska landsliðnum.

Svar:

**2.** Á Manchester United liðnum var hesin stóri bretin ein sannur risi í verjuni seinna partin av 80'unum og fyrrapartin av 90'unum. Hvør var bretski landsliðsleikarin, sum saman við Steve Bruce var álitið í verjuni framman fyri Peter Schmeichel.

Svar:

**3.** Á verandi liðnum hjá Liverpool er ein av hornasteinunum liðskiparin á finska landsliðnum. Hvussu eitur hesin sterki verjuspælarin, sum fá kendu, tá hann fyri trimum árum síðani kom til Liverpool?

Svar:

**7-VERJUKEMPUR**
**Ofta eru tað málskjúttarnir, sum eru stóru hetjurnar, men verjuleikararnir hava ofta ein minst líka týdningarmiklan leiklut. Hesa ferð eru tað tríggir av teimum heilst stóru verjukempunum, sum vit vilja hava nøvnini á.**

Navn:

Bústaður:

Telefon:

ATLANTIC AIRWAYS Sosialurin MB-TOURS